H71

faldari 5

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN

H71 - NEISTIN

Sunnudagin 12. januar kl. 16.30

Hoyvíkshøllin

BONUS
J&K
FØROYATELE
SUÐUROYAR SPARIKASSI
Advokatfelagið
Yviri við Strond
TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari
bilrokt.fo
P/F THOMAS DAM
ÍTRÓTTARDEILDIN · N. Finsensgota 5 · Tel. 31 14 03
polytan

PENSJÓN

BETRI AT HAVA
GOTT Í VÆNTU

1. januar 2014 kemur nýggja pensjónslógin í gildi. Hetta merkir at tað er lógarkrav, at allir føroyskir løntakarar gjalda til egna pensjón.

Við Betri pensjón hevur tú fult gjøgnumskygni. Tú sært, hvussu nógv tú sparir saman til eftirløn, hvussu nógv fer til tryggingar, og hvussu nógv verður goldið fyri umsiting.

Harafturat kanst tú fáa heilt upp til 32% í avsláttri, um tú samlar tínar tryggingar hjá Tryggingarfelagnum Føroyum og tína pensjón hjá Betri pensjón.

Set teg í samband við ein av okkara ráðgevum á tel 345 700 ella betri@betri.fo, so vit saman kunnu gjøgnumganga tíni tryggingar- og pensjónsviðurskifti.

betri.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Betri pensjón

EITT LÍV Í HONDBÓLTI KREVUR FRÁKOBLING

Mín besta íløga nakrantíð er mítt, eg meini okkara!, internet-radio. Tað er hetta, eg lurti at hvønn morgun, áðrenn hini eru risin. Alt er har, líka frá reformerandi studenta-útvarpi úr Teheran og marxistiskum frælsispráti frá Manchester til BBC Radio 4 í Birmingham.

Ja, enntá—um tað er tín preferansa—EURO-tekno úr Ruhr-distriktinum. Veruliga, alt er har, og tað er deiligt og avbjóðandi.

„Hví skrivar hann hetta her", hugsar tú kanska. Óivað er onkur leinkja til hondbóltin í hesum. Ella kemur hon nú. Eh, nei!

Ongin leinkja, onki poeng. Hetta var fullstendiga órelevant; bert ein ósmaklig reklama fyri internet-útvarpinum og hvussu lætt tað er, við einum rímiliga bíligum transsistorradio, at víðka um títt medvit, politiskt og musikalskt. Úr tínum køki.

Og tó, tí tað besta við hesum køkslurti er, at tað er so óluksáliga fjart frá hondbólti. Og tað er uppaftur longri frá ósosialum miðlum og føroyskum trivialjournalistikki.

'Avkobbling' er loysunarorðið. At kobla frá ger okkum, sum frá líður, betri før fyri at hava tunguna mitt í munninum, tá ið á stendur, at sýta fyri at taka avgerðir við einum revolvari at tinningini. Henda ger, at tú ikki fert heilt upp at koyra, tá tað gongur væl; og øvut, í panikk, tá tað gongur minni væl.

Og beint nú gongur tað kanska ikki so øgiliga væl hjá okkum, um vit nú bara konsentrera okkum um bestudeildina. (Annars einamest frálíkt, hvat er minst líka umráðandi, eyðveri tað.) Tað koyrir líkasum ikki ordiligt. Men, hey!, medaljur verða altso ikki tillutaðar primo januar. Leikarnir og liðið aftanfyri liðið hava eina sólarklára meining um tingini, og tað er henda sannføring og stabilitetur, ið røkkur á mál, tá alt kemur til alt.

Eg haldi sjálvur, at tá eitthvørt ikki gongur heilt soleiðis, sum Amy Winehouse prædikar, tá er tað bara at arbeiða tess harðari. Stríðast tað harðari. Leggja hvaðna meiri fyri.

So, spøkum best. Tað merkir ikki, at passión ella litinskapur, óblandað illsinni, er av tí ónda. Als ikki. Lat meg sitera Marx eftirsum longu nevndur omanfyri: „Tann besti formurin fyri rationalsimu er passiónin". Rætt hevur Karl, tí fólk, ið aldri flippa út, aldri fara útum seg sjálvi, tey eru ikki normal. Og heldur normalur enn lukkuligur, meini eg, tí tað er ræðuligt at vera við fólki, ið altíð eru yvirkát ella søkja hesa indvidualiserða lukku. Ræðuligt.

Nei, tunguna mitt í munninum... fyri tað mesta—við einum naturskursli av litinskapi í óvælvaldum løtum.

Skjótt verður semifinalutíð í steypakappingunum. Hesin hálvfinaludagur í ungdómsdeildini er ikki sørt líkur valdømisdøgunum, har demokratiið enn hevði nakað uppá seg og ikki trumfað av opportunistiskum samleikapolitikki. Tí tað ber illa til annað enn at ringja runt landið at finna útav, hvussu gongst hjá sínum liði. Tað

er jú deiliga sitrandi at telja saman, um vit í ár klára at fáa fleiri finalulið enn í fjør. Eisini, um tú ikki ella á hvørjum ári ikki hevur onkran, tú „eigur“ við. Oftani kennir tú so onkran, ið er heilt tætt at. Og sjálvt um tú sum leikari kanska ikki var við í sjálvari finaluni, tá er tað eitt upplivilsi allíkavæl, tí bonkurin kann vera nokkso stórur. Tað er forrestin nakað, venjarir eiga at hugsa um: at rotera eitt sindur, ókey „forsvarligt”—mann vil jú vinna, men kortini so at so nógv børn sum til ber sleppa at uppliva hesa hátíðarløtu.

Kyndil hava ofta havt nógv lið við í barnafinalunum, eitt finalufelag, meðan dreingjasíðan hjá VÍF og gentusíðan hjá Neistanum hava klárað seg væl.

Ikki tí, bláu dreingirnir hjá Haraldi eru fastir gestir í finaluni, hvat er vælkomið.

Seinnu árini, sum eitt annað Kina í stórslignum realpolitikki, hevur H71 otað seg inn á hesi feløg, í seinastuni faktiskt afturumlagt tey, fyrst við dreingjaliðum, men seinastu 2-3 árini eisini við suverenum gentuliðum. Eitt arbeiði, sumí álvara byrjaði í 2006-07, og sum vit nú njóta fruktirnar av.

Vónandi verður tað eisini so í ár, kanska tað betur aftur sum vit gera alt fyri at koyra á maskinuna við góðum venjarum og venjingum. Teim bestu. Og toli.

Rætt, nøkur ting, eisini í venjingum, kunnu betrast. Har eru nógv áhugamál, og onkuntíð ber okkurt yvir við eitt annað. Men um vit kurteisliga gera vart við hvat er gott, hvat kann blíva betri og hvat ikki er nóg gott, og soleiðis standa saman, tá verða vit bara tað sterkari.

Annars, eitt tíðspunkt, eg ikki skifti yvir á mítt darling internet-radio, er tá ið Egholm og Vatnhamar eru í luftini við Vikuskiftissendingini.

Fríggjadagur kl. 16 er KvF-tíme heima hjá mær. At hoyra Trónd sparra við seg sjálvan er ein av hasum har 100 tingunum, tú MÁST gera, áðrenn tú doyrt!

Eisini haldi eg hann duga óalmindeliga illa at fjala, at hann heldur við teim svørtu, hvat er deiliga subjektivt og smáprovokerandi. Meiri av tí, meiri av kapping og kanti, av gedignari rivalisering. Uttan passión, ongin stuttleiki.

Koyr á, H71!!!!!!!!!!!!!!!!!!!

Ítróttarfelagið Hoyvík H71
Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067
188 Hoyvík · www.h71.fo

NEVND
Sunneva Jakobsen, formaður
sunneva@liv.fo, 23 11 15

Gunn Ellefsen, næstformaður
ge@lawfirm.fo, 59 30 40

Agga Niclasen, nevndarlimur
h71faldarin@gmail.com, 50 86 89

Anna Dam, nevndarlimur
ad@lawfirm.fo, 51 90 82

Hallur Danielsen, kassameistari
hallurdanielsen18@gmail.com, 23 96 15

René Dahl Olesen, skrivari
renedo@faroeship.fo, 54 90 10

SAMSKIPARI
Hallur Danielsen
hdanielsen@sbwcargo.com

HEIMASÍÐUUMSITARI
Carl Herup Høgnesen
carlherup@gmail.com

Anfinnur Hovgaard
anfinnur@gmail.com

Agga Niclasen
H71faldarin@gmail.com
FALDARAUMSITARI
Agga Niclasen
h71faldarin@gmail.com, 50 86 89

SNIÐ, UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ
Pf. Føroyaprent, www.foroyaprent.fo
– svanamerktur prentlutur 541 705

MYNDIR
Jan Egil Kristiansen
26 22 40

ÚTGEVARI
H71

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN

Tórshavn: Heykavegur 4, á Hálsi, tel 31 12 50 • **Kambsdalur:** tel 44 44 41 • **www.2x3.fo** •

Melinga

AUBO Køkken & Bad

NÝGGJAN KØK?

Tann evropeiski køksmótin er beint nú svart hvít og stál.
Melinga fylgir rákinum, og er einkul og eksklusivur.
Handtakið á skuffum á skápum er eitt grafiskt element við beinum linjum.
Melinga er eitt dømi uppá íblástur, tikin úr Italia, blandað við norðurlendskari mentan og eitt sindur av góðskuni hjá Aubo - og er Melingakøkurin nú ein vælkomin limur í vøruúrvalinum hjá okkum.
Støkk inn á gólvið hjá okkum, so tekna vit tær ein nýggjan køk.

VENJARAFRÁGREIÐING DREINGIR 18

NÚ KAPPINGARÁRIÐ ER HÁLVRUNNIÐ, OG VIT ERU BYRJAÐI UPPÁ „ANNAN HÁLVLEIK", MÁ SIGAST, AT VIT KUNNU IKKI VERÐA ÓNØGD VIÐ GONGDINA Í KAPPINGINI, INNTIL VÍÐARI. UM VIT FARA INN Á ÚRSLITATÆNASTUNA, SO KUNNU VIT LESA, AT H71 HEVUR 12 STIG FYRI 6 DYSTIR. FYRI TANN GLØGGA LESARIN SIGUR HETTA LONGU NÚ, AT VIT ERU Á ODDA Í DEILDINI, MEN VIT ERU TÓ IKKI TRYGGARI ENN SO, AT VÍF ER Á EINUM ØÐRUM PLÁSSI VIÐ 8 STIGUM FYRI 5 DYSTIR.

Nú mikudagin 9/1 skulu vit so til Vestmanna, at „forsvara" oddasessin og er tað lagt upp til eitt ordans oddabrak sum dystirnir millum okkum, sum oftast eru. Um vit vinna, so kunnu vit so í øllum førum kanna okkum ta gulu føraratroyggjuna í eina tíð framyvir, men um vit tapa, so er alt víðopið aftur.

Í steypakappingini hava vit spælt eitt umfar, og endaðu vit á einum øðrum plássi við tað at vit leiktu javnt móti Víf, sum tó hevði betri málúrtøku. Kappingin komandi vikuskiftið í Hoyvíkshøllini er soleiðis sera týðandi fyri okkum. Vit skulu hava eitt 1 ella 2 pláss (um altso VIF tekur hitt plássið) um vit skulu koma í finaluna aftur í ár. Fyri okkara dreingir – sum hvørt ár hava verið á gula gólvinum á Hálsi – vil tað óivað kennast sum eitt miseydnað ár um hesin setningur ikki verður rokkin.

Tað hevur annars gingið væl við venjingini, og er tað ein stór hjálp at vera tveir venjarar. Vit høvdu eisini hjálp frá Janusi Sørensen í byrjanini av árinum, til hann fór aftur til Danmarkar mitt í september at lesa víðari. Í byrjanini vóru ikki so nógvir leikarar til venjing og nakrir vandu eisini við AA, so tá ið liðini skuldu meldast til kappingina, hildu vit ikki tað var ráðiligt at melda meiri enn eitt lið til. Tað vísti seg seinri at hetta kanska ikki var ein røtt avgerð, tí nú eru vit ov nógvir leikarar til bara eitt lið og tá tað eru fáir og tættir dystir og fleiri til hvørt plássið, so fáa summir ikki so nógva spælitíð, sum ein kundi ynskt.

Vit hava aftur í ár fingið góða hjálp, serligani í verjupartinum frá Rasmus Sørensen. Og tað eru vit sera fegnir um. Fleiri av okkara spælarum eru eisini við í 1. deild og AA deildini og tað er eisini at fegnast um. Hettar mennir leikararnar nógv og fáa teir eina

ábending um, hvat krevst av styrki, skjótleika og tekniskari snildi um ein vil „beganga“ seg á ovastu rók.

Sum heild eru menninir væl fyri, men tó eru fleiri sum kundu gjørt meiri við at vant bæði kondition og styrki sjálvir. Hetta er venjing sum ikki krevur annað enn vilja og áhuga fyri at menna seg sjálvan sum leikara.

Hvussu árið sum heild fer at hilnast, er ikki gott at vita, men sum sagt, so hava vit ein dyst móti VÍF mikudagin og kemur hann, at geva okkum eina ábending um, hvønn vegin pílurin kemur at venda.

Men sum altíð er málið greitt, og tað hevur tað verið tey seinast nógvu árini: vit fara eftir greipuni, hvørki meiri ella minni. Tað er bara upp til okkum sjálvi at avgera, um tað lukkast ella ikki, – vit hava tilfarið.

Um nakað neiligt skal leggjast afturat so er tað, at kappingin er so avmarkað við tað, at bert 4 lið eru í deildini. Tað er órógvandi, at stór siðbundin feløg sum Kyndil ikki hava eitt lið í deildini, men vit kunnu tó fegnast um, at onnur feløg finna saman í samstarv. Soleiðis hava Kíf og Víf felags lið bæði í d 16 og d 18.

At enda vilja vit bara siga, – koyr á H71, framtíðin er kølasvørt!

Vegna venjaratoymið
Hallur/Gunnar

HH = HOYVÍKSHØLLIN	SvL = Skúlin við Løgmannabreyt						
Kl.	Mánadag		Týsdag	Mikudag	Hósdag	Fríggjadag	
	HH	SvL	HH	HH	HH	HH	SvL
14.00						G12	
14.00						G12	
15.00	D12		D10	G12	D10	G14	
15.30	D12		D10	G12	D10	G14	
16.00	G12		G14	U8	G14	D16	
16.30	G12		G14	U8	G14	D16	
17.00	G10		G10		D12	D14	
17.30	G10	U6	G10		D12	D14	U8
18.00	AA	U6	AA		AA	D10	U8
18.30	AA		AA		AA	D10	G10
19.00	D16		AA		AA	D18	G10
19.30	D16		D12		D16	D18	
20.00	D14		D12	D14	D16	D18	
20.30	D14		G17	D14	G17		
21.00	D18		G17	D18	G17		
21.30	D18		G17	D18	G17		
22.00							
22.30							

Deildir	Viðmerkingar
AA	
D18	
D16	
D14	
D12	
D10	
G17	

Deildir	Viðmerkingar
G14	
G12	
G10	Venja eisini í fimleikahøllini í Skúlanum við Løgmannabreyt (SvL) fríggjadag kl. 18.30-19.30
U8	Venja eisini í fimleikahøllini í Skúlanum við Løgmannabreyt (SvL) fríggjadag kl. 17.30-18.30
U6	Venja í fimleikahøllini í Skúlanum við Løgmannabreyt (SvL) mánadag kl. 17.30-18.30

VENJARAYVIRLIT H71 KAPPINGARÁRIÐ 2013/2014

Deild	Heiti	Navn	Tlf	Teldupost
AA/1. deild	Høvuðsvenjari	Petur Mittún	218284	peturmittun@gmail.com
AA/1. deild	Hjálparvenjari	Halgir Dahl Olesen	549020	halgir@faroeship.fo
AA/1. deild	Kroppsligur venjari	Snorri Paturssón	222814	snorripatursson@hotmail.com
AA/1. deild	Liðleiðari	Lars Tornefeldt	266287	lars_tornefeldt@hotmail.com
AA/1. deild	Hjálpari	Rene Dahl Olesen	549010	renedo@faroeship.fo
D18	Høvuðsvenjari	Gunnar Djurhuus	507008	gunnardjurhuus@gmail.com
D18	Hjálparvenjari	Hallur Biskupstø	517606	hillar_1993@hotmail.com
D18	Hjálparvenjari	Janus Sørensen	264580	janussorensen88@mail.com
D16	Høvuðsvenjari	Birgir Poulsen	593011	bpo@eik.fo
D16	Hjálparvenjari	Rúni Højgaard	261415	runi_hoyvik@hotmail.com
D16	Hjálparvenjari	Bogdan Florea	581569	simoni_k_96@yahoo.com
D14	Høvuðsvenjari	Halgir Dahl Olesen	549010	halgir@faroeship.fo
D14	Hjálparvenjari	Bogi Davidsen	276704	bd0206u7@skulin.fo
D14	Hjálparvenjari	Jónas Djurhuus	506996	jonash71@gmail.com
D12	Høvuðsvenjari	Petur Mittún	218284	peturmittun@gmail.com
D12	Hjálparvenjari	Karl Oddmar Rasmussen	508338	karlor@live.dk
D12	Hjálparvenjari	Rói Joensen	555172	roi.joensen@gmail.com
D12	Hjálparvenjari	Gilli Wardum	220505	gilli.wardum@gmail.com
D10	Høvuðsvenjari	Jens á Skipagøtu	280325	jens.a.skipagotu@skulin.fo
D10	Hjálparvenjari	Rúni Højgaard	261415	runi_hoyvik@hotmail.com
D10	Hjálparvenjari	Hanus Norðberg	519856	hanusn@yahoo.com
D10	Hjálparvenjari	Bogdan Florea	581569	simoni_k_96@yahoo.com
G17	Høvuðsvenjari	Petur Martin Johansen	296260	fc.torshavn@mekonomen.fo
G14	Høvuðsvenjari			
G14	Hjálpari	Hallur Danielsen	504144	hallurd@olivant.fo
G14	Hjálpari	Rene Dahl Olesen	549010	renedo@faroeship.fo
G12	Høvuðsvenjari			
G12	Hjálparvenjari	Eindri Frýdal	274804	eindri94@hotmail.com
G12	Hjálpari	Jákup Símun Simonsen	214154	as@spekt.fo
G12	Hjálpari	Annfinn Simonsen	233474	as@spekt.fo
G10	Høvuðsvenjari	Hendrik Egholm	237410	hendrik@magn.fo
G10	Hjálparvenjari	Tróndur Joensen	272628	thoensen@hotmail.com
G10	Hjálparvenjari	Jákup Sverri Kass	212500	js_kass@hotmail.com
D8	Høvuðsvenjari	Djóni Højgaard	592173	djonsawow@hotmail.com
D8	Hjálparvenjari	Oddur Bech	255625	
G8	Høvuðsvenjari	Hallur Danielsen	504144	hallurd@olivant.fo
G8	Hjálpari	Sámal Paulason	223453	tsh@kallnet.fo
G8	Hjálpari	Silja Sámalsdóttir	521968	
G8	Hjálpari	Maria H. Weyhe	271036	
U6	Høvuðsvenjari	Beinta Ejdesgaard	226620	beinaej@hotmail.com
Ungdóms	Málmansvenjari	Ari Egason Dam	512090	aed@eik.fo
Ungdóms	Hjálpari	Hanus Kristiansen	239617	hakr@sbw.fo
Ungdóms	Hjálpari	Tóraldur Kollsker		

NORÐOYA SPARIKASSI

Saman finna vit bestu loysnina
- Vælkomin til eitt kundaprát

Ynskir tú at hoyra nærri um hvørjar tænastur vit kunnu bjóða tær, alt frá billáni, bústaðarláni, eftirløn og aðrar tænastur, ert tú vælkomin til eitt kundaprát í deild okkara í Tórshavn, í Saltangará í Fuglafirði ella í Klaksvík.

475000

Bílegg eitt kundaprát

Norðoya Sparikassi Hoyviksvegur 67 FO-100 Tórshavn Tel. 47 5000 ns@ns.fo www.ns.fo

HONDBÓLTSSKÚLIN HJÁ H71

MILLUM JÓL OG NÝAR VAR HONDBÓLTSSKÚLI Í HOYVÍK. EIN FULLTEKNAÐUR SKÚLI TÓK ÍMÓTI HONDBÓLTSKÁTUM UNGDÓMI ÚR ØLLUM FELØGUM. TAÐ ER ALTÍÐ GOTT Í SÆR SJÁLVUM.

Men undir kønari leiðslu av Flemming Oliver Jensen og skikkaðum venjarum hjá H71 annars vóru útlit fyri einum upplivilsi við substansi, og ikki bert sosialum dámi, hvat tað, at byggja brúgvar er.

Skúlin var býttur í bólkar við útgangsstøði í Hoyvíkshøllini. Basan, um tú vilt. Har møttust tey íðkandi, har var felags upphiting og áhugaverd hondbóltsvenjing.

Meðan ein bólkur stríddist í høllini, máttu onnur spíla oyruni og taka ímóti øðrum venjingum í Fima og Gundadalshøllini. Fjórði bólkurin gjørdi sær dælt av fimleikahøllini í Skúlanum við Løgmannabreyt.

Bólkarnir fingu allir somu venjing og skiftust millum hallir og aktivitetir.

Tað eydnaðist somikið væl, at tað kanska ikki verður neyðugt at bíða eitt heilt kalendaraár til enn ein Hondbóltsskúla hjá H71.

Fyrireikarnir takka fyri góða uppmøting og móttøku.

H71 sendi sín myndamann í skúlan at taka nakrar myndir. Vit lata myndirnar tala...

LEIKUM FAGURT

TIL LEIÐARAR, VENJARAR, DÓMARAR, FORELDUR, LEIKARAR OG ÁSKOÐARAR

LEIKUM FAGURT

- HAV JALIGAN ATBURÐ
- ROYN ALTÍÐ TÍTT BESTA
- VÍS VIRÐING FYRI ØÐRUM
- UMBOÐA FELAGIÐ SØMULIGA
- FAR VIÐ ØÐRUM, SUM TÚ YNSKIR, AT ONNUR FARA VIÐ TÆR

LEIKUM FAGURT

EIN HEILSAN OG ÁHEITAN FRÁ

TIL ALLAR H71'ARAR OG ONNUR, IÐ KOMA Í HOYVÍKSHØLLINA

SENDISTOVAN

amr.fo

TEY SVØRTU TØLINI

DYSTARYVIRLIT HJÁ H71 Í ATLANTIC AIRWAYS DEILDINI

Dato	Heimalið	Útilið	Úrslit
29.09.2013	StÍF	H71	29-30
09.10.2013	H71	Neistin	25-29
19.10.2013	Team Klaksvík	H71	26-32
23.10.2013	H71	VÍF	26-27
26.10.2013	Kyndil	H71	23-20
03.11.2013	H71	KÍF	28-25
10.11.2013	H71	StÍF	31-29
17.11.2013	Neistin	H71	20-20
01.12.2013	H71	T. Klaksvík	30-25
08.12.2013	VÍF	H71	29-27
15.12.2013	H71	Kyndil	26-26
21.12.2013	KÍF	H71	27-23
04.01.2014	StÍF	H71	24-22
12.01.2014	H71	Neistin	
12.02.2014	VÍF	Neistin	
12.02.2014	Team Klaksvík	H71	
19.02.2014	H71	VÍF	
22.02.2014	Kyndil	H71	
02.03.2014	H71	KÍF	
09.03.2014	Neistin	H71	
12.03.2014	H71	StÍF	
23.03.2014	H71	T. Klaksvík	
02.04.2014	VÍF	H71	
06.04.2014	H71	Kyndil	
12.04.2014	KÍF	H71	

STØÐAN ATLANTIC AIRWAYS DEILDIN

Nr.	Lið	Dystir	V.m	T.m.	Munur	Stig
1	KÍF	13	383	308	75	20
2	VÍF	13	405	353	52	18
3	StÍF	13	351	355	-4	14
4	H71	13	340	339	1	12
5	Kyndil	13	337	348	-11	12
6	Neistin	12	314	339	-25	10
7	T. Klaksvík	13	334	422	-88	4

LIÐINI HESUFERÐ

H71

Málmenn:

1 Ári Egason Dam

12 Tóraldur Kollsker

21 Hanus Kristiansen

Útileikarar:

4 Rúni West Højgaard

14 Sigmundur Dahl

5 Bogi Gaard Davidsen

17 Hallur Biskupstø

13 Bogdan Florea

6 Tróndur Arge

7 Esbern Patursson

10 Birgir Poulsen

15 Sigmundur Nolsø

6 Hanus Norðberg

18 Andor Sivertsen

21 Pætur Thomsen

8 Jónas Gunnarsson Djurhuus

3 Høgni Olafsson

Høvuðsvenjari: **Petur Mittún**

Venjari: **Halgir Dahl Olesen**

Málmansvenjari: **Hákun Djurhuus**

Liðleiðarar: **Andrass Marr Poulsen, Lars Tornefelt og René Dahl Olesen**

Neistin

Málmenn:

1 Mikkjal Hansen

12 Bjørn Mouritsarson Mohr

Útileikarar:

2 Rói Berg Hansen

3 Aleks Buha

4 Terji Mørk

5 Teitur Magnusson

6 Andras Joensen

7 Jugoslav Djumic

8 Hjalti í Jákupsstovu

9 John í Innistovu

10 Herbjørn Lava

11 Beinur Davidsen

12 Kristjan Dulavík

13 Jón Ludvig

14 Teis Horn Rasmussen

15 Rúni Eliassen

16 Torstein Balle

Høvuðsvenjari: **Áki Mørk**

Venjari: **Blagoje Buha**

Liðleiðarar: **Sjúrður Thomassen**

»GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«

SENDISTOVAN

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR